# Vit vaska tøk við hátrýsti



Tá ið tøk verða vaskað, nýta vit serligan takvaskara við hátrýsti. Trygdin er í hásæti. Og eingin vandi er á ferð, tá ið asbesttøk verða vaskað. Serstøk verja tryggjar, at takið verður vaskað væl og virðiliga uttan sprutt. Vatnið rennur niður í takrennuna.

Vit hava eisini hátrýstvaskara til bygningar, húsagrundir, tún og veggir. Óhumska, gróður og leys máling fýkur av.

**Ring 42 31 11**



**SANDBLÁSING**
VEGGJAREINSAN & TAKREINSAN

Spf. Sandblásing · 466 Ljósá · Fartel. 22 15 22 · Fax 42 34 32 · sandblasing@post.olivant.fo



**stuðulskonsert og dansur**



**fríggjakvøldið 20. august**
**konsert á platform kl. 21.00**
kári p
hanus g. johansen
terji rasmussen
sámal & ronnie - martin joensen - deja vu
finnur & ronnie (páll finnur páll)

**dansur á platform kl. 01.00**
all that rain
kostnaður 100 kr
peningurin fer til uttanlandsferð hjá børnum við krabbameini
atgongumerki kunnu keypast í forsølu í kunningarstovuni

PLATFORM discoteque
FFK føroya felag móti krabbameini
Sosialurin



ÚTBJÓÐING

## Vegur millum Skála og Strendur, 3 stig

**Við hesum verður arbeiðið Vegur millum Skála og Strendur, 3. stig boðið út í almenna lisitatión**

Arbeiðið verður boðið út sum høvuðsarbeiðstøka og fevnir um gerð av 10 m breiðum landsvegi, frá Gjógvará og suðureftir, umleið 1 km, herundir gerð av betongbrúgv um Prestá.

Útbjóðingartilfarið kann bileggjast í seinasta lagi 3. september 2004 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 5.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 9181-134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er sent aftur óskalað í seinasta lagi eina viku aftaná lisitatiónina.

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegur 5, Tórshavn, mikudagin 15. 2004 september kl. 14.00.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land



# HALDIÐ SOSIALIN

**450,-** um ársfjórðingin
- sparið **395,-** í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

**Sosialurin**
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Ókeypis
Verður sent óposTað
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn: ______
Bústaður: ______
Postnr.: ______
Bygd/býur: ______
Telefon nr.: ______
Undirskrift: ______

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn



# Vikuskifti

Nr. 158 • leygardagur • 21. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo




Nú skal Elin velja sjálv

Lesið síðu 4 og 5



*Jan Christiansen setir listastevnuna*
*Mynd: Maria Olsen*

Listastevnan betrar trivnaðin:

# Einki navn ov stórt

-Sum lítið oyggjasamfelag hava vit altíð avísar avmarkingar at geva okkumundir, men visjónin hevur tó altíð verið, at einki navn er ov stórt, at kunna framføra á Listastevnu Føroya segði Jan Christiansen, borgarstjóri, tá hann setti listastevnuna hjerfyri. Hann segði:

## Listastevna

– Hetta er fjórða árið á rað, at Listastevna Føroya verður hildin, og hesi árini hava vit havt eina røð av nýskapandi og fjølbroytt-um framførslum innan allar listagreinir.

Eg minnist stórfingnu uppsetingina av opraini "Madam Butterfly" í 2001, frálíka skotska orkestrið Runrig við rótum í tí keltisku traditiónini árið eftir - og ikki minst "Ósjónliga sirkusi" har dóttir navnframa Chaplin – Victoria Chaplin - saman við manninum átti pallin í fjør.

Tað høga listarliga støðið, listastevnan alla tíðina hevur havt, har dugnalig fólk skipa fyri, og við Norðurlandahúsinum sum miðdepli ger, at áhugin at vera við á stevnuni alsamt er vaksandi.

Sum lítið oyggjasamfelag hava vit altíð avísar avmarkingar at geva okkum undir, men visjónin hevur tó altíð verið, at einki navn er ov stórt, at kunna framføra á Listastevnu Føroya

Og í ár verður tað avgjørt stór nøvn, sum vit fáa høvi at síggja á palli. Her hugsi eg serliga um operasangarinnuna Kiri Te Kanawa, tann nýggja Maria Callas, ið onkur nevnir hana, og rokkbólkin Jethro Tull, sum vit komandi dagarnar fáa høvi at uppliva.

Men harumframt er ein hópur av øðrum tiltøkum, so sum listaframsýningar, filmir, fyrilestrar og eitt sokallað sápubløðrusirkus til tey yngru, umframt fleiri tónleikaframførslur, t.d. Celtic Tenors úr Írlandi og Fiddlers Bid úr Hetlandi.



*Havnar Hornorkestur spældi til setanina – frálíka væl*
*Mynd: Maria Olsen*

Aftur í ár fara nøkur av okkara egnu fremstu tónleikarum at upptraðka, og her hugsi eg um Teitur, hesaferð saman við orkestri, og Eyðvør Pállsdóttir, sum er við í einum spennandi felags írsk-íslendskum tiltaki.

Innan bókmentir, er heimskendi norski rithøvundurin Jostein Gaarder komin á vitjan - og nú vit tosa um bókmentir, so er tað um eina lítla løtu, at vit fáa at vita, hvør ið hevur vunnið skaldsøgukappingina, sum listastevnan hevur skipað fyri. Hini árini hevur stevnan skipað fyri líknandi kapping innan aðrar bókmentagreinir.

Í ár hava ikki færri enn 28 roynt síni kynstur at skriva eina skaldsøgu. Spennandi verður at vita, hvør fær heiðurin at vinna, og harvið tær 150.000 kr., ið fylgja við.

Tað at list og mentan kostar pening vita vit, og list á so høgum støði, sum Listastevna Føroya kann bjóða, krevur rættiliga nógv av fyrireikarunum.

Tiltakið skal hanga saman fíggjarliga, og vil eg nýta høvi til at takka bæði teimum størru og teimum smærri sponsorunum fyri teirra stuðul, so at vit eisini í ár kunnu hava eina listastevnu á altjóða støði. Tað er við gleði, at Tórshavnar býráð - sum saman við Norðurlandahúsinum er høvuðsaktørur fyri stevnuna - er við til at fíggja Listastevnu Føroya.

Tí umframt tær upplivingar vit fáa av stevnuni, gevur hetta eisini býnum nógvar ágóðar: Vit fáa nógv vitjandi til býin, fyritøkur njóta gott av stevnuni, og fólk gerast í góðum hýri av at kunna fara til okkurt av tiltøkumum, lisastevnan hevur at bjóða. Vit kunnu siga, at Listastevna Føroya er við til at seta Tórshavn og Føroyar enn sjónligari á heimskortið.

Stutt sagt, listastevnan ger, at trivnaðurin í býnum – ja, í øllum landinum gerst betri. Hvat meira kann ein ynskja sær.

Við hesum orðum vil eg bjóða tykkum at verða vælkomin til ta uppliving, sum vit komandi dagarnar fáa høvi at verða við til, og vil eg enda við at lýsa Listastevnu Føroya 2004 at vera setta.